# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nú er John einsamallur




**Mest óvæntaða úrslitið í 5. umfari í FM kappingini í talvi var, at Rani Nolsøe einki fekk burturúr ímóti Andreasi Andreasen, sum eftir fýra tey fyrstu umførini var aftastur í landsliðsbólkinum**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

John Rødgaard er eftir fimm umfør í FM kappingini í talvi fyri einstaklingar einsamallur á odda. John vann í dag við hvíta fólkinum ímóti Olafi Berg. Undan fimta umfarinum løgu John og Rani Nolsøe lið um lið á odda.

Í dag tapti Rani við svarta fólkinum ímóti Andreasi Andreasen, sum burturúr fýra teimum fyrstu umførunum bara hevði fingið eitt hálvt stig. Tí kann ikki annað sigast, enn at talan var um ógvuliga óvæntað úrslit.

Martin Poulsen, sum aftaná John Rødgaard hevur hægsta styrkistalið, er nú nummar tvey. Martin vann í dag við hvíta fólkinum ímóti Sjúrði Thorsteinsson. Talvið ímillum Ólav Simonsen og Terja Petersen endaði javnt. Einki úrslit er tókt frá talvinum, sum skuldi havt verið millum Torkil Nielsen og Finnbjørn Vang.

Støðan eftir fimm umfør: IM John Rødgaard 4,0 stig, Martin Poulsen 3,5 stig, Rani Nolsøe 3,0 stig, Olaf Berg 2,5 stig, Torkil Nielsen, Finnbjørn Vang, Ólavur Simonsen og Sjúrður Thorsteinsson 2,0 stig, Andreas Andreasen og Terji Petersen 1,5 stig.

Sætta umfar verður mikudagin klokkan 14: Terji Petersen-Olaf Berg, Sjúrður Thorsteinsson-IM John Rødgaard, Rani Nolsøe-Martin Poulsen, Finnbjørn Vang-Andreas Andreasen, Ólavur Simonsen-Torkil Nielsen.

# Høgni framman fyri øll hini

**Ungi maðurin úr Sandavági vann ímóti Heðini Gregersen, meðan talvið hjá Boga Hansen, sum var hin oddafiskurin, ímóti Herborg Hansen endaði remis**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir fimm umfør er tað framvegis stórur spenningur í unglingakappingini í talvi. Í dag legði Høgni Egilstoft Nielsen úr Sandavági seg eitt hálvt stig fram um næstu kappingarneytarnar. Tað megnaði hann, tá ið hann við svarta fólkinum fekk fulla úrtøku burturúr ímóti Heðini Gregersen.

Undan fimta umfari vóru Høgni og Bogi Hansen úr Klaksvík lið um lið á fremsta plássinum. Í dag hevði Bogi Hansen hvíta fólkið ímóti Herborg Hansen, sum eisini er úr Klaksvík. Talvið endaði remis. Heiðrikkur Jacobsen, sum eftir fjórða umfar hevði 3,0 stig, tapti í dag við hvíta fólkinum ímóti Margar M. Berg.

Støðan í toppinum eftir fimm umfør: Høgni Egilstoft Nielsen 4,5 stig, Bogi Hansen 4,0 stig, Herborg Hansen og Margar M. Berg 3,5 stig, Heiðrikkur Jacobsen, Heðin Gregersen, Rúni Vormadal, Vagnur Dam og Dánjal P. Jacobsen 3,0 stig.

Í sætta umfari í morgin sær skráin í toppinum soleiðis út: Høgni Egilstoft Nielsen-Herborg Hansen, Margar M. Berg-Bogi Hansen, Dánjal P. Jacobsen-Heiðrikkur Jacobsen og Vagnur Dam-Heðin Gregersen.

# Stórmeistari var ov stórur biti

**Helgi Dam Ziska tapti í gjár fyrsta talvið í EM kappingini, sum í hesum døgum er í Dresden í Týsklandi. Í dag verður mótstøðan ikki so øgilig, sum hon var í gjár**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Helgi Dam Ziska luttekur ikki í FM kappingini, sum í hesum døgum er í Klaksvík. Ivaleyst hevði ungi havnarmaðurin verið favorittur at vinna ta kappingina. Men Helgi hevur í staðin valt at luttaka í EM kappingini, sum sjøtul varð settur á í gjár, og sum heldur fram inntil á summarmála, 14. apríl, tá ið 11. og síðsta umfarið verður á skránni.

Í gjár var mótstøðan óguliga stór hjá Helga. Styrkistalið hjá føroyska telvaranum er 2389, og russiski mótstøðumaður hansara, Nikita Vitiugov, sum vann við svarta fólkinum, hevur 2592 styrkisstig.

Kappingin gongur fyri seg í Dresden í Týsklandi, og annað umfar verður klokkan 15 seinnapartin í dag. Mett út frá styrkistølunum verður mótstøðan hjá Helga ikki so stór í dag, sum hon var í gjár. Helgi skal við svørtum telva ímóti Paul Johansen úr Noregi. Styrkistalið hjá honum er 2108.

Luttakaratalið er stórt, og tað eru nógvir fínir telvarar í Dresden í hesum døgum. Samlaða luttakaratalið er 403. Styrkistalið hjá Helga er nummar 270. Russiski stórmeistarin, sum Helgi tapti ímóti í gjár eigur 69. styrkistalið.